# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 16.03.2023 |
| Mál nr.: | 23/03968-3 |
| Málsviðgjørt: | TVR/AJ |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um biografar**

Løgtingslóg nr. 93 frá 4. oktober 1984 um biografar, sum broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009 verður sett úr gildi.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Loyvi frá landsstýrismanninum til at reka biograf ella til almennar filmssýningar verður mett sum eitt óneyðugt bureaukratiskt fyribrigdi og heldur ikki í samsvari við ynskið hjá sitandi samgongu um meiri armslongd á mentanarøkinum. Harumframt er tað ógvuliga sjáldan, at tey, ið ynskja at sýna filmar alment, av sínum eintingum søkja Almanna- og mentamálaráðið um loyvi. Almanna- og mentamálaráðið má harafturímóti venda sær til fyriskipararnar, so hvørt tað fréttist um ætlanir um at hava almennar filmssýningar. Umsitingin av lógini er tí nakað merkt av tilvild.

Lógin sipar í § 1, stk. 4 til lógina um filmseftirlit fyri at fáa loyvi frá landsstýrismanninum, ið kann sigast at vera dømi um sensur, men lógin um filmseftirlit varð sett úr gildi við lógini um miðlaráð til verju fyri børn og ung frá 2007. Síðstnevnda lóg er enn galdandi og liggur undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Miðlaráðið sjálvt varð niðurlagt í byrjanini av 2011, og einki virksemi hevur verið síðani.

Tað er tí torført at fáa eyga á, hvat tað er, sum landsstýrisfólkið í mentamálum skal geva loyvi til, sum annaðhvørt ikki er sett úr gildi, ella sum ikki er løgskipað í aðrari lóggávu, tá ið tað eitt nú kemur til brunatrygd, arbeiðsumhvørvi og vinnuloyvi.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Um nýggjur biografur skal setast á stovn, skal verða søkt um loyvi frá landsstýrismanninum. Hetta kemur ógvuliga sjáldan fyri. Í løtuni eru 2 virknir biografar: Havnar Bio og Atlantis Bio.

Um stovnar, feløg ella einstaklingar s.s. Norðurlandahúsið, Løkshøll, Mentanarhúsið í Fuglafirði, kommunur, kirkjur, ungdómshús o.l. ynskja at hava almenna filmssýning, skal verða søkt um loyvi.

Biografloyvi eru galdandi í 5 ár, og sambært § 8 í biograflógini skal søkt verða um endurnýggjan, tá loyvi er útgingið. Ummæli frá kommununi og løgregluni skulu fáast til vega, og um loyvið hevur verið nýtt á fullgóðan hátt, serstakliga hvat valið av filmum viðvíkur, eigur endurnýggjan av loyvinum ikki at verða noktað, uttan so at tað eftir landsstýrisins meting fyriliggja heilt serstakar umstøður.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið er at avtaka eina lóg, ið verður mett ótíðarhóskandi, óneyðug, og sum heldur ikki virkar væl í praksis, eins og endamálið samstundis er at tryggja armslongd við politisku skipanina.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Biografar skulu ikki longur søkja landsstýrið um loyvi at stovnseta og reka biografar, eins og fyriskiparar av einstøkum sýningum heldur ikki skulu søkja landsstýrið um loyvi. Tó skulu hesir altíð halda krøv í aðrari lóggávu t.d. um brunatrygd, arbeiðsumhvørvi og vinnuloyvi.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið er sent til ummælis hjá hinum stjórnarráðunum, Havnar Bio, Atlantis Bio, Vinnuhúsinum, Norðurlandahúsinum, Kommunufelagnum, LISA, Klippfisk, Filmshúsinum, Løkshøll, Mentanarhúsinum í Fuglafirði, SALT og Føroya Stiftsstjórn.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Ongar fíggjarligar avleiðingar eru av lógaruppskotinum.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur jaligar fylgjur fyri umsitingina í Almanna- og mentamálaráðnum.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur jaligar fylgjur fyri tey, ið reka biografar ella skulu hava einstakar filmssýningar, tí tey ikki noyðast at ómaka sær við at søkja politiska myndugleikan um loyvi áðrenn.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Ongar avleiðingar av uppskotinum eru fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið at avtaka biograflógina hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Ein avtøka av biograflógini hevur helst jaligar avleiðingar í mun til altjóða skyldur Føroya at virða og tryggja skrivi- talu- og framsøgufrælsið, ið er fevnt av grein 10 (1) í EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru av uppskotinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Ongar ásetingar eru um skatt ella avgjøld í lógaruppskotinum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Nei.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Nei.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Nei.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**
Aftan á frágreiðingina um avleiðingarnar av lógaruppskotinum verða avleiðingarnar í nr. 2.1 til og við 2.8 svaraðar við "ja" ella "nei" í talvuni niðanfyri.

Eru ongar avleiðingar, verður svarað "nei". Eru avleiðingar, eisini smávegis, verður svarað "ja".

Svarast skal bara "ja" ella "nei". Svarast skal í allar teigar. Klombur (ja) ella (nei) o.tíl. eigur ikki at verða brúkt.
(Sí nr. 1.2.2.17. í rundskrivinum um lógarsmíð).

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

Løgtingslógin setir úr gildi galdandi lóg um biografar. Samstundis fara allar broytingarlógir og galdandi treytir givnar sambært biograflógini úr gildi.

Almanna- og mentamálaráðið, xx. mars 2023

**Sirið Stenberg**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: